# Um høgl í ágørnini.

(Corpora aliena appendicis).

Eftir *P. Dahl.*

Nýliga hava vit á Dronning Alexandrines Hospitali havt til viðgerðar sera forkunnugt og sjáldsamt dømi um høgl í ágørnini (appendix).

Hetta dømi er yvirhøvur nógv líkt tí, sum *Jansby* (1957) hevur kunngjørt, men er kortini so serkent, at vit skulu greiða eitt sindur frá tí her.



*1. mynd.* Danski tilburðurin. Ágørnin í manninum.
Danish case. Appendix in situ.



*2. mynd.* Føroyski tilburðurin. Ágørnin í manninum.
Faroese case. Appendix in situ.

*Sjúkrasøga.*

Dagbókatal nr. 301/1959. Sjúklingurin, 34=ára gamalur, er bilstjóri við kolanám, har hann vanliga arbeiðir, men hevur á hvørjum sumri tey seinastu árini verið í Grøn= landi. Varð røntgenmyndaður í januar í ár fyri sjúku í geislunum. Funnið varð, at eitt petti av 4. lendageisla var sprongt av, gamalt brot, sum av og á píndi mannin. Á hesi røntgenmynd, 2. mynd, sást tá eins og perlurað av einum=

hvørjum, ið líktist tí sum kunngjørt var av *Jansby* (1957), og sum mynd sæst av her, 1. mynd.

Myndin hjá Jansby er av misgávum vend øvugt, men í hesi grein viðvend.

Umrøddi Dani var íðin veiðimaður og hevði etið so nógv av skotnum djórum, at funnin vóru 63 høgl í ágørnini. Sjúklingur okkara hevur ongatíð havt álvarsamar sjúkur, ikki havt ágarnabruna ella aðrar búksjúkur, bert fingið viðgerð fyri lendaverk (lumbago). Vanligur døgurðamatur hjá honum hevur, sum hjá Føroyingum flest, um summarið verið væl av skotnum fugli, ikki minst í Grønlandi.

Rátt varð honum til at lata ágørnina skera burtur og so varð gjørt. Ágørnin lá hjá hesum manni beint aftantil



*3. mynd.*
Føroyska ágørnin úrtikin við høglum í.
The appendix taken out with shot in. Faroese case.

á langabotninum árakað innlopið av vilunum (ilium). Tað var tí ikki gjørligt at skera ágørnina burtur á vanligan hátt, men neyðugt at veita frá búkinum aftaná at bundið var um ágørnina 2 reisur. Í ágørnini, 3. mynd, vóru 56 høgl nr. 3 umframt ein kolamoli til støddar 0,4 × 0,5 × 0,6 cm.

Um sjúku hansara skal annars verða sagt, at hann hevði ov høgt blóðkroppafall alla tíðina (36—64 og 32—64), Hglb. % 105, Ewald 90 $cm^3$, 30/63. Einki sjúkligt í landinum, blóðtrýst 150/100. Í blóðinum vóru ikki reyðir blóðkroppar við basophilum kornum.

## SUMMARY

A case of foreign bodies (shot) in appendix is reported and compared with a Danish case described by Jansby (1957).

## BÓKMENTIR

1. *Jansby, K.*: Corpus alienum processus vermiformis. Ugesk. f. læger 119/:626, 1957.

## *3. talva. Fiti í feskari havsild árini 1951–58.*

*(Fat content of fresh herring during the peiod 1952–58).*

| | Januar | | | Mai | | | Juni | | | Juli | | | August | | | Oktober | | | December | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | D | F | FT | D | F | FT | D | F | FT | D | F | FT | D | F | FT | D | F | FT | D | F | FT |
| 1952 | | | | 20 | 8,2 | 28,2 | 11 | 11,1 | 35,8 | 5 | 14,9 | 43,2 | 24 | 19,9 | 51,4 | 15 | 21,1 | 48,5 | | | |
| | | | | 20 | 8,7 | 28,6 | 11 | 10,9 | 34,7 | 9 | 16,7 | 49,3 | | | | | | | | | |
| | | | | 21 | 8,4 | 30,2 | 19 | 13,9 | 42,9 | | | | | | | | | | | | |
| | | | | 21 | 6,8 | 23,7 | | | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | 8,0 | 27,7 | | 12,0 | 37,8 | | 15,8 | 46,8 | | 19,9 | 51,4 | | 21,1 | 48,5 | | | |
| 1953 | | | | | | | 7 | 7,2 | 25,2 | 9 | 13,3 | 38,7 | | | | 20 | 24,3 | 57,4* | 18 | 19,3 | 53,3* |
| | | | | | | | 8 | 7,0 | 26,4 | 13 | 17,9 | 46,1 | | | | | | | 18 | 12,9 | |
| | | | | | | | 18 | 10,6 | 31,1 | 14 | 17,9 | 48,4 | | | | | | | | | |
| | | | | | | | 27 | 12,0 | 34,6 | 15 | 17,4 | 48,3 | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | 18 | 19,2 | 47,2 | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | 9,2 | 29,3 | | 17,1 | 45,5 | | | | | | | | 12,9 | |
| 1954 | 9 | 12,6 | 37,6 | 31 | 7,4 | 24,9 | | | | 5 | 17,7 | 49,7 | | | | 18 | 17,2 | 45,9 | | | |
| | 22 | 11,0 | 35,6 | | | | | | | 5 | 17,0 | 47,5 | | | | 27 | 19,6 | 50,0 | | | |
| | | | | | | | | | | 9 | 16,2 | 45,1 | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | 13 | 18,8 | 50,1 | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | 26 | 20,3 | 50,9 | | | | | | | | | |
| | | 11,8 | 36,6 | | 7,4 | 24,9 | | | | | 18,0 | 48,7 | | | | | 18,4 | 48,0 | | | |
| 1955 | | | | | | | 4 | 9,4 | 31,5 | 18 | 18,6 | 49,5 | | | | | | | | | |
| | | | | | | | 9 | 8,1 | 28,2 | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | 13 | 10,0 | 33,4 | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | 19 | 9,2 | 31,8 | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | 26 | 15,6 | 46,6 | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | 10,5 | 34,3 | | 18,6 | 49,5 | | | | | | | | | |
| 1956 | | | | | | | | | | 14 | 16,5 | 47,7 | 10 | 18,8 | 51,1 | | | | | | |
| | | | | | | | | | | 25 | 18,1 | 49,1 | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | 17,3 | 48,4 | | 18,8 | 51,1 | | | | | | |
| 1957 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 1 | 13,3 | 39,6 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 12 | 12,8 | 37,8 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 13,1 | 38,7 |
| 1958 | 12 | 14,0 | 41,2 | | | | 18 | 7,0 | 23,9 | 19 | 19,8 | 50,5 | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | 30 | 21,1 | 55,2 | | | | | | | | | |
| | | 14,0 | 41,2 | | | | | 7,0 | 23,9 | | 20,5 | 52,9 | | | | | | | | | |

*) Sýnislutirnir ikki taldir upp í miðaltølini í 4. talvu.
(Sampels excluded from figures in 4. table).

D = Veiðudagur (Day of catch).
F = % fiti av feskari sild (Per cent of fat of fresh herring).
FT = % fiti av turrevni (Per cent of fat of dry matter).